# lýstur á tvang



*– Um kvoturnar undir Eysturgrønlandi og á Grand Bank verða býttar yvir trý skip saman við teimum rættindum, vit hava á Flemmish Kap og við Svalbard, er lítil ivi um, at raksturin hjá rækjuskipunum hevði sæð betur út, sigur reiðarin, Tórbjørn Jacobsen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

– Við at krevja skipið á tvingsilssølu, hevur Føroya Sparikassi sagt, at hann ikki vil vera við í hesi verkætlan meira, og hetta er ein avgerð, sum fíggingarstovnurin hevur tikið. Tí arbeiða vit við øðrum "modellum" um, hvussu vit kunnu varðveita skipið og fáa tað í vinnu aftur, nú útlitini í rækjuvinnuni hóast alt eru betur, enn tey hava verið leingi, sigur hann.

### Brúka tíðina væl

Tórbjørn Jacobsen vil ikki siga alment, hvussu reiðaríið hugsar sær, at ein møgulig loysn kemur at síggja út.

– Vit fara nú at brúka hesa tíðina so væl sum tilber. Ein lýsing um tvingsilssølu er ikki einstýðandi við, at skipið verður selt, leggur reiðarin dent á.



*– Vit hava einar sjey vikur at loysa málið í, og eg vóni, at vit hava eina loysn, áðrenn skipið verður selt á tvingsilssølu, sigur Tórbjørn Jacobsen, reiðari*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Kunnandi fundur á Rækjuvirkinum



*Rækjuvirkið á Oyri*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Í dag klokkan 16 skipar leiðslan á Rækjuvirkinum á Oyri fyri kunnandi fundi fyri starvsfólkunum, har greitt verður frá útlitunum hjá virkinum**

RÆKJUVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er ikki bara føroyski rækjuskipaflotin, sum seinastu árini hevur ligið í andaleypi. So hvørt, sum rækjuskipini eru fækkaði í tali, er spurningurin eisini vorðin aktuellur, hvussu Rækjuvirkið á Oyri í framtíðini fer at fáa fatur á rávøru.

Sosialurin hevur frá álítandi keldum fingið at vita, at leiðslan á Rækjuvirkinum á Oyri í dag fer at hava kunnandi fund við starvsfólkini um støðuna.

Stjórin á virkinum, Hans Jákup Johansen, vil ikki siga nakað ítøkiligt um, hvat fundurin fer at snúgva seg um, men vit skilja, at tosað verður um viðurskiftini sum heild.

Rækjuvirkið á Oyri eigur rækjur niðurfyri til einar 4-5 vikur, men síðan er ikki greitt, hvussu verður við rávøru.

Á virkinum verður arbeitt í tveimum vaktum, har eini 20-25 fólk eru á hvørji vaktini, og eini 200 tons av rækjum verða virkað til lidna vøru um vikuna.

## Journalførari/skrivari á Landsskjalasavninum

**Eitt hálvtíðarstarv sum journalførari á Landsskjalasavninum og skrivari hjá landsskjalavørðinum er leyst at søkja til setan 1. mars ella so skjótt sum til ber. Starvið er fyribilssett til 31. desember 2006.**

Starvið umfatar journal- og skrivstovuhald.

Umsøkjarar skulu í minsta lagi hava skrivstovuútbúgving ella annað prógv javnsett hesum. Umsøkjarar eiga at hava royndir við manuellari/elektroniskari journalføring og skrivstovuarbeiði, og hava kunnleika til roknskap.
Starvið krevur at umsøkjarar eru nærlagdir, hava samstarvsevni, eru tænastuáhugað og kunnu arbeiða sjálvstøðugt.
Tað er ein fyrimunir um umsøkjarar hava áhuga í savnsarbeiði.

Landsskjalasavnið kann bjóða eitt fakligt mennandi starv við nógvum avbjóðingum, innan eitt øki, sum er í broyting.

Starvið er lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi fakfelag.

Meira fæst at vita við at venda sær til Sámal T.F. Johansen, landskjalavørð, tlf. 316677, fartlf. 218039 ella á telduposti fararch@lss.fo.

Umsóknir við prógvum, yvirlit yvir starvsroyndir og møguligum viðmælum skulu sendast til:

**Landsskjalasavnið**
**V.U. Hammershaimbsgøta 24**
**FO-100 Tórshavn.**

Umsóknir skulu vera Landsskjalasavninum í hendi í seinasta lagi 21. februar 2006, kl. 12.00.

Landsskjalasavnið hevur sum høvuðsuppgávu at tryggja varðveitingina av savninum við søguligum virðum og fyrisitingarligum og rættarligum týdningi.